# 89 suðuroyingar afturat mist arbeiðið

**Fiskavirking hevur nú sagt øllum teimum tímaløntu starvsfólkunum í Hvalba og í Vági, úr starvi**

HÓPUPPSAGNIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú hava 89 suðuroyingar afturat mist arbeiðið.

Røðin av arbeiðsleysum suðuroyingum hevur verið long nú í langa tíð, men í gjár kundu so 89 suðuroyingar afturat melda seg inn í ALS.

Tað er Fiskavirking, sum nú hevur sett hópuppsagnir í verk í Suðuroynni.

Talan er um tey 89 tímaløntu arbeiðsfólkini, sum hava verið knýtt at saltfiskavirkinum í Vági og at Flakavirkinum í Hvalba.

Meinhard Jacobsen, stjóri í Fiskavirking, sigur, at sum støðan er nú, er ikki grundarlag fyri at halda fram við virkseminum á flakavirkinum í Hvalba og á saltfiskavirkinum í Vági.

Tað var Fiskasølan, sum hevði hesi bæði virkini.

Men tá ið Fiskavirking yvirtók Fiskasøluna, yvirtók Fiskavirking samstundis eisini virkini í Hvalba og í Vági.

Síðani hevur lítið og onki virksemi verið á teimum báðum virkjunum.

Og í gjár varð so endaliga greitt, at tað er ógvuliga ivingarsamt, hvussu verður við virkseminum framyvir, tí nú eru øll tey 89 tímaløntu fólkini, sum vórðu knýtt at teimum báðum virkjunum, uppsøgd.

Tilsamans arbeiddu eini 40 fólk á hvørjum virki tað seinastu tíðina, tey vóru opin.

Sigast kann kortini, at uppsagnirnar koma ikki heilt óvart á. Tey flestu hava mett, at talan bara hevur verið ein spurningur um tíð, tí síðani Fiskavirking yvirtók virkini, hevur at kalla ikki ein stertur verið keyptur til virkini at virka.

Og tey føldu seg ikki tryggari, hóast nevndarformaðurin í Fiskavirkin stutt eftir yvirtøkuna, váttaði, at hann kendi ikki nakað til nakrar ætlanir um at stongja flakavirkið í Hvalba og saltfiskavirkið í Vági.

### Fleiri milliónir í halli

Meinhard Jacobsen sigur, at felagið, sum hevur rikið bæði flakavirkið í Hvalba og saltfiskavirkið í Vági, hevur havt fleiri milliónir í halli.

Fiskasølan, sum rak tey bæði virkini, hevur annars váttað, at virkini gingu illa, men uppundir ársskiftið var farið at síggja frægari út og at virkini góvu avlop í seinastuni og at vónirnar fyri framtíðini vóru frægari.

Men hesum vísir Meinhard Jacobsen aftur

– Virkini góvu stórt hall, sigur hann.

Hann fær tó ikki sagt akkurát, hvussu stórt hallið var. Men tað var meiri enn bæði ein, tvær og tríggjar milliónir, sigur hann.

Og hann leggur afturat, at hann hevur ongi tøl, sum vísa, at vend var við at koma í gongdina.

– Vit kunnu ikki halda fram við virksemi, sum gevur hall, leggur hann afturat. Og í løtuni er sostatt tíverri ikki grundarlag fyri at halda fram við arbeiðnum og tí varð neyðugt at siga fólkunum upp, so at tey ikki skulu hanga í leysari luft.

Tað er eitt rakstrarfelag í Hvalba, sum hevur staðið fyri at reka flakavirkið í Hvalba og saltfiskavirkið í Vàgi, sum leigaði seg inn í húsið hjá Palm Seafood.

Hinvegin er tað eitt ognarfelag í Hvalba, sum Hvalbingar eiga tað mesta av, sum eigur sjálvan flakavirkisbygningin.

Stjórin í Fiskavirking sigur, at tey nú fara tey at umhugsa møguleikarnar fyri virkjunum í Hvalba og í Vági.

– Vit kanna møguleikarnar fyri framhaldandi rakstri, men hvørjir møguleikar eru, veit hann ikki.

Men hann nevnir eisini møguleikan fyri, at onkur annar leigar seg inn í bygningin í Hvalba og í Vági og, sum hættar sær undir at reka tey víðari.

Hann bíðar eisini eftir, um tann nógv umrøddi fiskapakkin, sum landsstýrið arbeiðir við, fer at gera mun, so at meiri fiskur kann koma upp á land í Føroyum.

– Hvørjir møguleikar kunnu stinga seg upp, vita vit ikki, men vit kanna allar møguleikar. Og stingur ein møguleiki upp, eru vit til reiðar at taka arbeiðið uppafturfrá degi til dags, sigur stjórin í Fiskavirking.

Men, hvat hendir við tó stóra flakavirkinum hjá Fiskavirkin í Vági, veit Meinhard Jaocbsen onki um enn og tað hevur hann ongar viðmerkingar til í løtuni.



*Síðani Fiskavirking yvirtók flakavirkið í Hvalba og saltfiskavirkið í Vági, hava arbeiðsfólkini sæð skriftina á vegginum. Og í gjár fingu tey 89 fólkini, sum hava verið knýtt at báðum virkjunum, uppsøgn frá Fiskavirking*

# Jógvan við Keldu krevur avsannan

**Landsstýrismaðurin í innlendismálum, Jógvan við Keldu kennir seg ærumeiddan av grein í Oyggjatíðindum, og krevur eina avsanna frá blaðstjóranum. Dan Klein vil lítið siga um kravið frá landsstýrismanninum**

ÆRUMEIÐING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Ein sjónlig avsannan á prenti og 10.000 krónur til Reyða Kross.

Hetta eru greiðu boðini frá advokatinum hjá landsstýrismanninum í Innlendismálum, Jógvan við Keldu, til blaðstjóran á Oyggjatíðindum, Dan Klein.

Á forsíðuni á Oyggjatíðindum mikudagin er ein grein, sum viðgerð persónin Jógvan við Keldu. Landsstýrismaðurin í innlendismálum heldur viðgerðina í Oyggjatíðindum verða so niðursetandi og ærumeiðandi, at hann hevur vent sær til ein sakførara.

Advokaturin hjá landsstýrismanninum, Jógvan Páll Lassen, hevur sent Dan Klein eitt bræv, har hann krevur av blaðstjóranum at avsanna tíðindaflutningin og rinda 10.000 krónur til Reyða Kross í samband við innsavningina fyri flóðalduvanlukkuna í Asia.

Ger Dan Klein ikki tað, verður málið lagt fyri rættin, har kravt verður endurgjald og harðasta revsing sambært lógini.

### Lesið Oyggjatíðindi

Blaðstjórin á Oyggjatíðindum, Dan Klein, hevur ikki stórvegis viðmerkingar til kravi og hóttanina um stevning frá advokatinum hjá Jógvani við Keldu.

- Tit fáa at vita í komandi blað, hvørja støðu eg havi í málinum. Eg havi onga aðra viðmerking til málið í løtuni, sigur blaðstjórin á Oyggjatíðindum.

Vit royndu at fáa eina viðmerking frá landsstýrismanninum í innlendismálum, men tað eydnaðist tíverri ikki. Við Norðlýsið mikudagin segði Jógvan við Keldu seg ikki hava nakra viðmerking til málið, og vísti til skrivið frá advokatinum.

### Brævið frá Advokatskrivstovuni til Oyggjatíðindi

Oyggjatíðindi – Att: Dan Klein, ábyrgdarstjóri:

Jógvan við Keldu, landsstýrismaður hevur vent sær til undirritaða í sambandi við grein í Oyggjatíðindum 5. januar 2005 undir yvirskriftini "Lover Boy".

Blaðið brúkar meginpartin av forsíðuni til at umtala klient mín sum "Lover Boy" og hevur á síðu 3 eina grein um eina kontaktlýsing.

Alt innihaldið tí viðvíkjandi er tikið úr leysari luft, og hevur einki við veruleikan at gera og tað er so hvat tað er, men bæði uppseting, innihald v.m. av greinini er grovt ærumeiðandi og niðursetandi fyri mín klient, bæði tá hugsað verður um hansara starv sum landsstýrismaður og ikki minst hansara virksemi í frítíðini, sum tú sjálvandi ert kunnugur um, bæði hansara arbeiði innanfyri tónleik og innan ávísa kristiliga samkomu.

Greinin hevur eittans endamál, ið er at niðurseta virðið millum manna av klienti mínum.

Hetta verður ikki latið óátalað aftur við borðinum, og skal eg tí siga frá, at um so er, at viðlagda avsannan ikki verður prentað í fyrst komandi blað tykkara á sjónligum stað og at kr. 10.000,- verða goldnar til Reyða Kross í sambandi við innsavningina fyri Tsunami-vannlukkuna í Asien innan fríggjadagin 7. januar 2005, verður málið uttan aðra ávaring lagt fyri rættin fyri brot á revsilógina § 267 og verður bæði kravt endurgjad og harðasta revsing, sambært lógina.

Virðingarmest, Jógvan P. Lassen, adv

# Keldumaðurin klagar

**Landsstýrismaðurin í innlendismálum, Jógvan við Keldu, hevur sent stjóranum í Útvarpi Føroya ein klagu um tíðindaflutningin í samband við útlendingamálið. Landsstýrismaðurin heldur tíðindaflutningin vera skilaleysan, sum hann málber seg**

KLAGA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Nógvir skeivleikar. Skilaleyst. Fullkomiliga misvísandi.

Tað trýtur ikki við neiligum lýsingarorðum frá landsstýrismanninum, Jógvani við Keldu um tíðindaflutningin hjá Útvarpi Føroya seinastu vikuna í samband við útlendingamálið. Seinastu vikuna hevur Útvarp Føroya viðgjørt málið um hjúnini Daniel og Ioanu Rapa úr Vestmanna, sum hava bíðað í 10 mán-aðir um at fáa svar frá Innlendismálaráðnum um uppihaldsloyvi í Føroyum.

Landsstýrismaðurin er alt annað enn samdur við viðgerðini av málinum í Útvarpi Føroya, og tí hevur hann sent stjóranum í Útvarpi Føroya, Jógvani Jespersen, eina klagu um tíðindaflutningin.

Landsstýrismaðurin ger millum annað vart við, at tíðindafólkini á Útvarpi Føroya hava ikki sett seg nóg væl inn útlendingamálið, og hetta er fremsta orsøk til, at tíðindaflutningurin, eftir hansara tykki, er grovur og óreingjandi, sum hann málber seg í klaguni.